VÁGS BÓLTFELAG
FO-900 Vágur, Postrúm 134
Tlf.373679 / Fax 373679
www.vb1905.fo

FORMAÐUR:
John Henrik Holm

STOVNAÐ:
05.06.1905

MEISTARAR (1):
2000

STEYPAVINNARAR (1):
1974

GREIPUVINNARAR:
ongantíð

Í 1. DEILD (44 ÁR):
1943, 1946-50, 1952, 1956-1959, 1966-1981, 1987-1993, 1995-

Í EUROPA (2):
Meistarakapping 2001/2002, Intertoto 1998/1999

# VB kann hótta

**Hópurin hjá VB telur bæði eldri og royndar leikarar, eins og ungar evnaríkar leikarar. Fær venjarin, Hans Nielsen, blandað kortini rætt, er lítið at ivast í, at VB kann hótta fleiri av hinum liðunum**

**Terji Nielsen**
*terji@sosialurin.fo*



*VB skal í ár spæla á nýggjum graslíkisvølli á Eiðinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað hevur mangan verið trupult at mett um styrkina hjá VB undan einum kappingarári, tí teir hava verið rættuliga óstøðugir. Okkurt árið hava teir ligið í niðurflytingarvanda, og fyri einans fýra árum síðani vóru teir føroyameistarar fyri fyrstu og einastu ferð í næsta 100 ára gomlu søgu felagsins.

## Verjan sær sterk út

Hyggja vit at hópinum hjá VB, so er tað serliga har afturi á vøllinum, at liðið sær út til at verða sterkast. Málverjin Bjarni Johansen hevur í mong ár verið ein av okkara allarbestu, og í verjuni framman fyri sær hevur Bjarni sterkar leikarar sum Eyðun Jacobsen, Jón Gærdbo, danan Anders Sørensen og so annan av nýggju litavunum Dalius Stalelinas, ið sigst verða ein framúr góður bakkur.

Á miðjuni er liðið kanska ikki eins sterkt sum í verjuni, men hinvegin hevur liðið her kanska sín størsta profil. Jugoslavin Milan Kulic, ið nú hevur verið nøkur ár í VB, er stýrmaðurin á liðnum hjá vágbingum, og tá ið hann hevur ein góðan dag, kann alt henda. Afturat sær á miðjuni hevur Kulic eisini góðar mans í eitt nú Mortan úr Hørg og Palla Augustinussen.

Annar av nýggju litavisku leikarunum hjá VB er ein áleypari, ið kallast so mikið sum Mindaugas Grigalavicious, og hesin sigst verða ein vandamikil harri, sum saman við antin Birgir Jørgensen ella Símun Samuelsen kann mynda eitt rættuliga vandamikið álop. So alt í alt kann ikki sigast annað enn, at fær venjarin blandað kortini rætt, so hevur VB eitt rættiliga sterkt lið, ið kann spæla mongum eitt puss.

## Eisini lið í 2. deild

Í ár hevur VB eisini lið í 2. deild, og tað er eitt fyrimunur, ið fleiri av hinum liðunum í 1. deild ikki hava. At hava eitt lið í næstbestu deildini ger, at tá ið skaðar og leikbann raka, so hava eykamenninir góða dystarvenjing frá næstbestu deildini. Onkur feløg í 1. deild so sum HB, ÍF og Skála hava ikki lið í næstbestu deildini, og munurin millum 2. og 3. deild er rættiliga stórur, og hann speglast sjálvsagt aftur í dystarvenjingini hjá eykaleikarum.

Í Vági verður nýtt grasliki lagt á vøllin undan hesum kappingarárinum, og nógvir fótbóltskønir føroyingar halda hetta verða ein vansa fyri VB.

Tað hevur fleiri ferðir verið ført fram í fjølmiðlunum, at gamli vøllurin var ein stórur fyrimunur hjá vágbingum, tí hann var so ójavnur, at bert vágbingar sjálvir megnaðu at spæla á honum, og at VB á henda hátt ognaði sær nógv stig, ið teir annars ikki høvdu fingið til høldar. Um so er, er ilt at meta um, men vágbingar sjálvir hava mangan sagt, at gamli vøllurin var teimum ein bági, tí hann var so nógv øðrvísi enn aðrir vøllir, og hetta kostaði teimum dýrt, tá ið teir leiktu á útivølli.

Tí meta teir tað verða ein fyrimun fyri teir, at nýtt grasliki verður lagt á vesturi á Eiðinum. Hvør ið hevur rætt, finna vit út av, so hvørt sum kappingin líður.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar:** | | | |
| Bjarni Johansen | 18/-30 (1-0) | 2/-5 | |
| Heini Jacobsen | | | |
| **Verja:** | | | |
| Eyðun Jacobsen | 15/0 (0-0) | | |
| Eyðstein í Lágabø | 2/0 (0-0) | | |
| Jón Gærdbo | 2/0 (0-0) | | |
| Anders Sørensen (DAN) | 7/0 (1-0) | | |
| Janus Kjærbo | 9/0 (0-0) | | |
| Dalius Stalelinas (LIT) | | | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Kári í Lágabø | 5/0 (0-0) | | |
| Milan Kuljic (JUG) | 18/6 (1-0) | | |
| Palli Augustinussen | 18/1 (1-0) | 1/0 | |
| Mortan úr Hørg | 16/0 (3-0) | | Sumba |
| Poul Poulsen | 6/0 (1-0) | | |
| Jákup Olsen | 3/0 (0-0) | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop:** | | | |
| Birgir Jørgensen | 17/7 (3-0) | | FSV, Sumba, TB |
| Dan Djurhuus | 15/0 (3-0) | | |
| Símun Samuelsen | | 1/0 | GÍ |
| Mindaugas Grigalavicious (LIT) | | | |
| **Tilgongd** | | | |
| Símun Samuelsen | 16/4 (2-0) | | GÍ |
| Dalius Stalelinas (LIT) | | | Litava |
| Mindaugas Grigalavicious (LIT) | | | Litava |
| **Frágongd** | | | |
| Michael í Lágabø | 9(0 (1-0) | | |
| Dejan Nikolic (JUG) | 13/0 (1-1) | | uttanlands |
| Slobodan Madzar (JUG) | 14/0 (6-1) | | uttanlands |
| Hallur Joensen | | | |
| Gisli Sveinbjørnsson | | | Royn |
| Predrag Zivkovic (BOS) | 16/0 (2-2) | | uttanlands |
| Brian Andresen (DAN) | 9/2 (1-0) | | uttanlands |
| **Venjari** | | | |
| Hans Nielsen | | | |



# Málið er Europa

**Vágbingar hava sett sær eitt greitt mál fyri kappingarárið í ár. Ætlanin er at vinna sær pláss í europeiskum fótbólti til næsta ár, tá ið Vágs Bóltfelag fyllir 100 ár**

**Terji Nielsen**
*terji@sosialurin.fo*



*Tað er umráðandi at seta ungt fólk við, so at framtíðin hjá VB verður tryggjað, heldur nýggi venjarin, Hans Nielsen*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

Fyri fyrstu ferð í langa tíð hevur VB fingið sær ein føroying sum venjara, og harafturat er hann vágbingur.

Nevndin í VB hevur í ár latið Hans Nielsen leiðsluna av besta fótbóltsliðnum hjá felagnum, og hann er farin til verka við góðum treysti.

Hans Nielsen hevur ikki áður roynt at vant eitt lið í bestu mansdeildini, men hann hevur verið venjari bæði í 2. og 3. deild, umframt 1. deild hjá kvinnum.

## Trupul uppstartur

Venjingarumstøðurnar hjá VB hava verið alt annað enn góðar í fyrireikingunum til kappingarárið við tað, at ikki hevur verið gjørligt at vant á vøllinum í Vági, tí har verður nýtt grasliki lagt á. Ístaðin hava vágbingar verið noyddir til at koyrt norður til Tvøroyrar tríggjar ferðir um vikuna at venja. Hetta merkir, at leikararnir og venjarin hava nýtt okkurt um fýra tímar til hvørja venjing, tá flutningur til og frá Tvøroyri verður taldur við.

Venjarin hjá VB, Hans Nielsen, sigur, at lítið man verða at ivast í, at VB hevur havt vánaligastu venjingarumstøður av øllum liðunum í 1. deild undan kappingarbyrjan, og at hendan tíðin hevur verið rættuliga strævin.

At tað bert hevur verið gjørligt hjá VB at vant á vølli tríggjar ferðir um vikuna, merkir sjálvsagt, at teir allarhelst eru nakað aftan fyri hini liðini, hvat viðvíkur bóltførleika í løtuni. Vøllurin í Vági verður tó klárur aftur í næstum, og Hans Nielsen ivast ikki í, at tað fer beinan vegin at síggjast aftur á liðnum hjá VB.

## Tunnur hópur við góðum fólki

Eins og so nógv onnur av bygdafeløgunum hevur VB ikki tað stóru breiddina. Hans Nielsen sigur, at teir hava gott fólk til byrjunaruppstillingina, men pláss er ikki fyri skaðum og leikbannum, tí so er galið beinanvegin, sigur venjarin hjá VB.

VB hevur nakrar leikarar, ið hava spælt á liðnum í rættuliga mong ár, og hetta eru sjálvsagt tær berandi kreftirnar á liðnum. Málverjin Bjarni Johansen, verjuleikarin Eyðun Jacobsen, miðvallarin Milan Kulic og áleyparin Birgir Jørgensen eru eru hesir, ið skulu vísa vegin fyri teimum yngru leikarunum.

Hans Nielsen sigur, at tað unga fólkið, ið er á veg á besta liðið hjá felagnum, er rættuliga gott, og VB hevur eisini góð úrslit at vísa á í yngru deildunum. Millum annað gjørdust unglingarnir hjá vágbingum føroyameistarar fyri tveimum árum síðani, og dreingjaliðið hjá VB hevur verið føroyameistari seinastu trý árini á rað, so alt talar fyri eini bjartari framtíð, sigur nýggi venjarin hjá VB.

At summir av hesum eisini sleppa at royna seg á besta liðnum í ár, dylur Hans Nielsen ikki fyri, tí hann heldur tað verða umráðandi at seta ungt fólk við, so at framtíðin verður tryggjað. Nakað av rokandum verða á liðnum í kappingarárinum, so at teir ungu fáa høvi at royna seg, sigur Hans Nielsen. VB hevur í ár eisini lið í 2. deild, og tað heldur Hans Nielsen verða ein avgjørdan fyrimun, tí so kunnu teir leikarar, ið sita nógv á beinkinum í 1. deild av og á koma niður at fáa dystarvenjing í 2. deild.

### Metingin

Tað er trupult at meta um, hvussu tað fer at ganga hjá vágbingum í bestu deildini í ár. Stór útskifting hevur verið á liðnum, og harafturat er venjarin, Hans Nielsen, eisini nýggjur. VB hevur fingið tilgongd av tveimum sterkum litavum og eisini er ungi Símun Samuelsen komin heim aftur til barndómsfelagið at leika. Hópurin telur eina blanding av ungum og eldri leikarum, men breiddin er ikki stór, tí verður VB neyvan millum tey lið, ið stríðast um heiðursmerki.

## Útlendsku venjararnir sett dám á hugburðin

VB hevur seinastu mongu árini einans havt útlendskar venjarar, og Hans Nielsen er fyrsti føroyingurin í rættuliga nógv ár, ið venur VB. At teir mongu útlendingarnir hava sett dám á fótbóltin í Vági er eyðsæð, og Hans Nielsen sigur, at serliga er tað hugburðurin hjá monnum, ið útlendingarnir hava sett sín dám á. Hetta sæst eisini aftur í ár, har leikararnir trúfast hava møtt upp til venjing, hóast at umstøðurnar hava verið sera vánaligar. Tó sigur Hans Nielsen, at teir eru sera takksamir fyri, at tvørámenn hava verið so mikið lagaligir, at tað hevur borið til hjá VB at vant á Tvøroyri.

Hans Nielsen heldur, at menn hava verið óførir at møta upp til venjing, og hóast teir hava verið noyddir at brúka einar fýra tímar til hvørja venjing. so hava tað at kalla hvørja ferð verið eini 25 mans og vant. Av og á hevur tað ikki ligið fyri hjá onkrum at vant, tí at tað hevur verið trupult at fáa fulltíðarstarv, 4 tímar venjing og familju at ganga upp í eina hægri eind, og tað hevur sjálvsagt gjørt uppstartin hjá VB enn torførari.

## Europa er málið

Í Vági eru tey greið yvir, at tað ikki er føroyameistaraheitið, ið strembast skal eftir. Men ambitiónirnar eru høgar, og venjarin hjá vágbingum sigur, at málið er at vinna sær pláss í europeiskum fótbólti til næsta ár, tá ið VB fyllir 100 ár. Hans Nielsen væntar, at kappingin um føroyameistaraheitið fer at standa millum havnarliðini bæði, B36 og HB, meðan tað fer at verða ógvuliga javnt millum liðini í miðjuni av deildini. Hann sigur seg vænta, at tað fara at verða nógvir sokallaðir "marginaldystir", har tað fer at standa og vippa, hvønn veg sigurin fer í einum dysti. Hevur VB tað neyðuga hepni, heldur nýggi venjarin hjá vágbingum tað ikki verða ógjørligt at standa við einum europeiskum atgongumerki við kappingarlok.